*Tíðindaskriv 06-09-2019*

# Betri Trygging: 91 mió. kr. til tryggingartakarar í ár

Tað gongur væl í føroyska samfelagnum, og nógva virksemið sæst eisini aftur í øktum tryggingarinntøkum.

"Tryggleikin hjá kundunum og tryggleikin undir okkara virksemi hevur størsta týdningin. Tí krevst, at vit leggja niðurfyri í góðum tíðum, so vit kunnu standa trygg eisini í verri tíðum", sigur Ingunn Eiriksdóttir, forstjóri í Betri Trygging.

Úrslitið fyrra hálvár í 2019 vísti eitt avlop á 77,2 mió. kr. áðrenn skatt. Góða úrslitið er serliga orsakað av stórum afturføringum av skaðaavsetingum, jaligu gongdini á virðisbrævamarknaðinum og einum betri grundrakstri.

Fyrra hálvár 2019 hevur verið merkt av fleiri stórum eldsbrunum í sethúsum. Í alt vóru 5.800 skaðar, og er hetta heldur fleiri skaðahendingar enn fyrra hálvár 2018. Betri Trygging hevur goldið 91 mió. kr. til tryggingartakarar, sum hava havt skaða hetta fyrra hálvárið.

**Fyrra hálvár hjá Betri Trygging í stuttum:**

- Úrslitið áðrenn skatt: 77 mió. kr.
- Bruttotryggingargjøld 195 mió. kr.
- Skaðaendurgjøld tils.: 91 mió. kr.
- Tal á skaðum: 5.800
- Eginogn: 641 mió. kr.